## Barnabók úr Sámalandi

Nú gevur Bókadeildin út nakað so forkunnugt sum eina søgu eftir ein sámiskan rithøvund. Bókin er til tey eitt sindur størru børnini og eitur Mítt løgna lív. Sera skemtiliga greiðir rithøvundurin Risti Sokki frá dronginum, sum ræðist reinsdjór, men sum tíbetur fær eina systur, sum als ongan ræðist. Mítt løgna lív vann í fjør kappingina í Sámalandi um at skriva nýggja barnabók.




# Lundin flýgur aftur í ring

**Í Settorvu á Viðoynni er pisa í hvørjari lundaholu, og tað er fyrstu ferð í mong ár**

FUGLUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Tað eru fleiri ár, síðani lundin var so væl fyri sum í summar. Í Settorvu er pisa í hvørjari holu*
*(Mynd: Jens Kr. Vang)*

Settorva norðantil á Viðoynni er eitt tað besta lundalandið í landinum, men eins og aðrastaðni hevur lítil lundi verið í Settorvu tey seinastu árini. Men eins og á hinum lundaplássunum er støðan eisini ørvísi har í ár.

– Tey seinastu árini hevur eingin fuglur verið, men í ár er øðrvísi. Hini árini sat fuglurin ikki væl, men í ár er hann munandi spakari, sigur Esmar Sørensen á Viðareiði. Í síðstu viku fingu teir 1.600 lundar í Settorvu, og fyrradagin fingu teir 860. Hitt góða lundalandið hjá viðoyingum er Urðin, og hagar skuldu teir fara í dag. Fyrraárið góvust teir tann 10. juli, tí tá var eingin lundi eftir.

Esmar Sørensen sigur, at støðan hjá lundanum er munandi broytt. Tey seinastu árini kom lítið og einki undan, men tá viðoyingar vóru í Settorvu í síðstu viku, var egg í hvørjari holu. Hetta var kanska í seinna lagi, men tá teir vóru aftur mánadagin, vóru pisurnar komnar út. Og tað var pisa í hvørjari holu. Viðoyingar hava eisini sæð, at sildberin ber nógv, so tað er nógv føði hjá fuglinum.

Tað stendur ikki á hjá viðoyingum at sleppa av við lundan. Tvørturímóti er eftirspurningurin sera stórur, og telefonin ringir í heilum. Ein grýtuklárur lundi av Viðareiði kostar 45 krónur.

### Urðin fór illa

Viðoyingar hava ikki verið í Urðini síðani landnyrðingsódnina síðst í januar, men Esmar Sørensen sigur, at frá báti hava teir sæð, at tað Urðin hevur fingið stóran skaða í ódnarveðrinum.

– Tað er týðiligt, at ódnin fór stak illa við Urðini, so nú fara vit at vita, hvussu har sær út, sigur Esmar Sørensen.

Tað eru tvey ár, síðani viðoyingar seinast vóru í Urðini eftir lunda.



*Hesin lundin sat í Gjáarkjaftinum við Gjógv gjáramorgunin*
*(Mynd: Sofus D. Johannesen)*



*Tað er gott pláss við bryggjuna á Eiði nú*
*(Mynd: Sofus Johannesen)*

# Havnarútbygging til færri bátar

**Fyri nøkrum døgum síðani varð havnarútbygging á Eiði tikin í brúk, men tað er tómligt við atløgubryggjuna**

HAVNIR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 24. mai í fjør samtykti bygdaráðið í Eiðis kommunu, at kommunan skuldi útvega sær tilboð upp á at leingja atløgusíðuna 60 metrar. Arbeiðið varð boðið út ímillum byggifeløgini Articon og J&K, og fýra vikur seinni, tann 20. juni, samtykti bygdaráðið so at taka av einum tilboði frá Articon, sum var til reiðar at gera arbeiðið fyri góðar 4,6 milliónir krónur.

Týsdagin í síðstu viku var tann útbygda havnin handað bygdaráðnum. Á lítlari samkomu týsdagin 08.07.08, varð útbyggingin av havnarlagnum á Eiði handað kommununi. Talan er um 60 metur leinging eystureftir, og við hesum er bryggjan niðan fyri gamla Norðís nú 129 metrar long.

Tað hevur verið rættiliga tómligt við atløgubryggjuna á Eiði í seinastuni, og spurningurin er so, um útbyggingin var neyðug. Annfinnur Kruuse var virkandi borgarstjóri, tá bygdaráðið samtykti at byggja havnina út.

– Tað kann kanska tykjast løgið at byggja havnina út, samtíðis sum bátarnir fækka, men tað er nú eina ferð soleiðis, at kommunan skal útvega vinnulívinum karmar, sigur Annfinnur Kruse.

Hann vísir á, at tá útróðurin er á Norðhavinum, koma nógvir bátar til Eiðis at avreiða, og tað kemur tað væl við at hava nóg mikið av atløgusíðu. Harafturat geva teir bøttu karmarnir vinnulívinum fleiri møguleikar at menna seg, heldur hann.